


# Marek venur 1. deild hjá KÍ

Við at seta Eyðun Klakstein og Trygva Mortensen sum venjarar hjá Formula-liðnum, mátti KÍ eisini finna nýggjan venjara til 1. deildarliðið hjá felagnum. Hesin er nú settur, og verður tað Marek Wierzbicki, sum skal røkja uppgávuna. 42 ára gamli pólverjin hevur í ár spælt á næst besta KÍ-liðnum, og fáur man ivast í, at hann hevur royndir, sum kunnu koma ungum viðspælarum tilgóðar.

# Todi skal hava maskot

Eins og hini stóru feløgini í Danmark vil Fremad Amager eisini hava ein maskot, sum kann hjálpa til at stuðla liðnum, tá dystir eru á skránni. Fyri at finna rætta maskottin, hevur felagið nú skrivað út kapping, har lesarar hjá lokala Amagerbladet kunnu koma við góðum hugskotum. Persónarnir handan bestu fimm hugskotini fáa ein Amager-pakka við spælaratroyggju við autografum, tveimum fríbillettum til heimadystir, tveimum stadionplakatum og tveimum sonevndum drekkibillettum. Tá maskotturin er funnin, verður nýggja kapping, har navnið á hesum skal finnast.

## Nýggjur B36-formaður

Eftir eyakaaðalfund í farnu viku hevur nevndin í B36 umskipað seg. Størsta broytingin er, at Sjúrður Norðbúð ikki longur er formaður í felagnum. Tann sessurin er nú yvirtikin av Per Hansen, sum varð valdur í nevndina á eykaaðalfundinum. Per hevur tó í fleiri øðrum umførum verið í nevnd hjá B36, og tí er talan ikki um nakran nýggjan mann, sum nú tekur við formanssessinum.

Nývaldur í nevndina var eisini Gunnar Reynslág. Hesin er nú kassameistari í felagnum.





## Góðir brúktir bilar frá P/F Wenzel

| | Bilaslag | Litur | Árg. | Km | Prísur | Tilboð |
|---|---|---|---|---|---|---|
| VM358 | Opel Astra 2.0 Dti 5 h. (def. pumpa) | reyður | 1999 | 180.000 | fyrr 54.900 | Nú 35.000 |
| VU965 | Citroen Xara 2.0 Hdi stw | gráur | 2001 | 142.000 | fyrr 99.900 | Nú 60.000 |
| KT975 | Ford Fiesta 1.3i Ambiente 5H | gráur | 2005 | 23.000 | 128.900 | |
| RJ380 | Ford Mondeo 1.8i 5H | vínreyður | 1995 | 135.000 | 29.900 | |
| JP955 | Skoda Octavia 1.6i sedan | grønur | 2001 | 128.000 | 89.900 | |
| BT720 | Ford Focus 1.6i Ghia sedan | gráur | 2002 | 96.500 | 149.900 | |
| RD274 | Ford Focus 1.6i Stw | bláur | 2000 | 92.700 | fyrr 89.900 | Nú 60.000 |
| AS228 | Citroen Xara 1.6i 5 hurðar | grønur | 2003 | 46.000 | fyrr 139.900 | Nú 100.000 |
| LN752 | Ford Focus 1.8 Tdci Ghia | gráur | Nov-02 | 78.000 | fyrr 159.900 | Nú 140.000 |
| HJ084 | Peugeot 307 2.0i 3 hurðar | lilla | 2002 | 38.000 | fyrr 124.900 | Nú 98.000 |
| JS981 | Skoda Octavia 1.6i sedan | bláur | 2000 | 85.000 | fyrr 99.900 | Nú 68.000 |
| PH461 | Ford Escort 1.6 3 hurðar | hvítur | 1991 | 170.000 | 3.000 | |
| PH412 | Ford Focus 1.4i 5 hurðar | vínreyður | 2001 | 95.000 | 89.900 | |
| JK062 | Ford Focus 1.8 Tdci stw | bláur | 2002 | 150.000 | 149.900 | |
| GP195 | Ford Escort 1.6i 3 hurðar | reyður | 1996 | | 2.900 | |
| HK516 | Ford Focus 1.8 Tdi stw | bláur | 2002 | 90.000 | fyrr 117.900 | Nú 80.000 |
| MB323 | Ford Focus 1.4i 5 hurðar | gráur | 2001 | 92.000 | fyrr 84.900 | Nú 70.000 |
| UV729 | Ford Focus 1.8 Tdci 4 hurðar | grønur | 2002 | 98.000 | 149.900 | |
| KS151 | Mazda 323 2.0 Diesel 4 hurðar | gráur | 1998 | 254.000 | fyrr 29.900 | Nú 19.000 |
| FU581 | Hyundai Accent 1.3i 3 hurðar | grønur | 1999 | 122.000 | 25.900 | |
| AG603 | Suzuki Alto 1.0i 5 hurðar | bláur | 2005 | 35.000 | 64.900 | |
| AP717 | Ford Focus 1.8 Tdci stw | gráur | 2002 | 123.000 | 149.900 | |
| BG139 | Opel Zafira 1.8i 7 pers. | bláur | 2004 | 48.000 | 204.900 | |
| LN650 | VW Polo 1.9 SDI stw | bláur | 1998 | 100.000 | 54.000 | Nú 40.000 |
| HP367 | Toyota Picnic 2.0i 7 pers. | bláur | 2000 | 152.000 | fyrr 114.900 | Nú 100.000 |
| HU894 | Ford Focus 1.6i aut. stw | grønur | 2000 | 47.000 | 104.900 | |
| PK236 | Ssangyoung 2.0 Tdi aut. | svartur | 2006 | 12.000 | 244.900 | |
| DV221 | Ford Focus 1.8 Tdi van | gráur | 2001 | 72.000 | 79.900 | |
| VM412 | Peugeot 307 2.0 Hdi 5 hurðar | gráur | 2003 | 65.000 | 148.000 | |
| JS951 | Ford Mondeo 2.0i 4 hurðar | gráur | 2003 | 35.000 | 179.900 | |
| MH791 | Ford Fiesta 1.3i Ambiente 5 h. | bláur | 2004 | 33.000 | 114.900 | |
| UR489 | Ford Focus 1.8 Tdci stw | gráur | 2004 | 54.000 | 174.900 | |
| TM844 | Ford Mondeo 2.0i Sport sedan | gráur | 2004 | 28.000 | 224.900 | |
| AB032 | Hyundai Galloper 2.5 TD 7 pers. | grønur | 1999 | | 105.000 | Nú 95.000 |

P/F Wenzel

Akranesgøta 5 · FO-100 Torshavn
tlf: 354500 · fax: 354501
fordpost@wenzel.fo · www.wenzel.fo


# Todi byrjar helst inni



*Todi byrjaði at venja, tá hann kom til felagið í mars mánaði. Í annað kvøld verður hann fyri fyrstu ferð við frá fyrsta bríksli*

**Trumfurin hjá Fremad Amager verður nú lagdur á borðið. Todi Jónsson verður við frá byrjan, tá Fremad Amager tekur móti Atla Danielsen og Frem í morgin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan verður um føroyingaruppgerð í Sundby Idrætspark, tá Frem kemur á vitjan hjá Fremad Amager í morgin.

Millum spælararnar hjá vitjandi liðnum verður uttan iva Atli Danielsen, eins og Frem helst hevur Gunnar Nielsen á beinkinum.

Hjá heimaliðnum hava Jónas Tór Næs, Andrew av Fløtum og Tem Hansen spælt nógv í ár, men tað verður helst ikki á teimum, at størsta fokus verður hósdagin.

Eftir øllum at døma verður hetta nevnliga fyrsta ferðin, at Todi Jónsson verður millum teir fyrstu ellivu hjá Fremad Amager. Gongdin hjá felagnum hevur ikki verið nakað serliga góð seinastu dystirnar, og í løtuni eru teir bert tvey stig oman fyri niðurflytingarstrikuna.

Komandi vikurnar telja tó fleiri lyklauppgerðir móti niðaru støddu liðunum, og tað leggur um nakað enn størri trýst á liðið. Todi var fyrstu ferð á vøllinum, tá Fremad Amager um vikuskiftið tapti 3-0 fyri Fredericia, sum tykist ávegis superliguni. Ta ferðina loysti hann Andrew av Fløtum av eftir 66 minuttum, men hesa ferð verður tað so frá byrjan, at Todi skal royna seg.

Frem er í løtuni á 8. plássi í donsku 1. deild.

## Javnleikur í oddadystinum



Kvinnuliðini hjá B36 og KÍ spældu í gjárkvøldið málleysan javnleik í Gundadali. Undan dystinum var B36 trý stig framman fyri KÍ, og tí høvdu gestirnir als ikki ráð at tapa.

Uppskriftin hjá heimaliðnum var hin sama, sum tá tær vunnu 1-0 á KÍ fyrr í ár. Tær løgdu dent á verjupartin, fyri síðani at dúva upp á skjótálop, og fyri tað nógva eydnaðist hetta eisini. Ta eina ferðina høvdu tær eisini bóltin í netinum, men málið varð tó kolldømt fyri rangstøðu.

Mál komu tó ikki, og tí er munurin millum liðini framvegis tann sami.